# Gerðabók í sambandi við býráðsfund nr. 5/2021

**Dagfesting:** 27.05.2021 kl. 19:00
**Málnr.:** 21/00071-5

Býráðslimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, David Andreasen, Edva Jacobsen, Ólavur Larsen, Magni Jøkladal, Eivin Breiðaskarð og Gudny Vang

Tiltakslimir:

Ikki møtt:

Onnur: Marin Sólheim Thomsen, fíggjarleiðari, luttók í sambandi við málið um ársroknskapin hjá Fuglafjarðar kommunu fyri 2020

Býráðsskrivari: Henrik Weihe Joensen, kommunustjóri

Atkvøtt um at taka 2 mál av skránni, ávíkavist endurskoðan av reglugerð um stuðlamúr og útbjóðingarskriv viðvíkjandi matriklunum 769b og 882b, Úti á Land, Fuglafjørður. Býráðið samtykti einmælt (9-0), at taka nevndu mál av skránni.



| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| 17/21 | 21/00096-3 | Skótarnir - Umsókn um fíggjarligan stuðul<br>Arkivmál 19/00377 |
| 18/21 | 21/00200-27 | Roknskapur hjá Fuglafjarðar kommuna fyri 2020 |
| 19/21 | 21/00240-3 | Meka_Nýggj el-innlegging |
| 20/21 | 21/00288-3 | Broyting í byggisamtyktini fyri part av økinum, matr. nr. 530, frá B-øki til E-øki, sum er ogn hjá Eilif Eliasen, og matr. nr. 477a, frá B-øki til E-øki, sum er ogn hjá Fuglafjarðar kommunu |
| 21/21 | 21/00198-6 | Zeta_Miðnám á Kambsdali_3. byggistig_Útbygging_Skipanaruppskot og myndugleikaprosjekt saman við umsókn um byggiloyvi |
| 22/21 | 21/00326-3 | Uppskot til útstykkingarætlan í Rossagerði millum landsvegin og bygt øki omanfyri Toftanesvegin á økinum frá matr. nr. 771a til matr. nr. 786, Fuglafjørður |

**17/21**

**21/00096-3 Skótarnir - Umsókn um fíggjarligan stuðul**
**Arkivmál 19/00377**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.03.2021 | 8/21 |
| 2 Mentamálanevndin | 09.04.2021 | 12/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.04.2021 | 17/21 |
| 4 Býráðið | 26.04.2021 | 12/21 |
| 5 Býráðið | 27.05.2021 | 17/21 |

**Tilráðing**



| Til viðgerðar í | Mentanarnevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing | Skótaliðið verður 60 ár í 2021 Gullbrandur er stovnað 9. feb 1961 og Erla Kongsdóttir 8. sept 1961. Ætlanin er at halda dagin seinri í heyst.Til dagin er ynskiligt at skótahúsið verður fríðkað.<br>Í stuttum verður sókt um stuðul á 375.000 kr til fylgjandi arbeiðir<br>• Skifta tekju<br>• Mála húsið<br>• Fríðka økið uttanfyri<br>• Renovera trappuna<br><br>Ískoyti til málslýsing: EáL og eg sjálv høvdu fund við Bárð Petersen fyri skótarnar tann 25. Apríl. Bárður varð kunnaður um at mentanarnevndin er posetiv, men at málið mátti fyri nevnd aftur og síðani í fíggjarnevnd. BP kunnaði um at tá svar fyriliggur frá nevndini, verður umsókn send til fyritøkur um møguligan stuðul til verkætlanina. BP hevði havt ráðgeva innyvir til prísáseting av arbeiðinum sum skal gerast. Alt eftir upphædd, má málið fyri fíggjarnevnd í komandi viku.<br><br>**Framhald 13. apríl 2021**<br>Mentamálanevndin hevur á fundi tann 9. apríl í ár tikið avgerð um, at mæla til at stuðla verkætlanini við 30 tús. kr. av rakstrarstaði 550, men harumframt, um tað er møguligt, at stuðla skótaliðnum við 150 tús. kr.<br><br>**Framhald 22. apríl 2021**<br>Fíggjarnevndin samtykti á fundi í dag, at biðja býráðið um eina eykajáttan á 150 tús. kr. sum stuðul til skótaliðið, í høvuðsheitum við ti endamáli, at leggja nýtt tak á skótahúsið. Ein møgulig eykajáttan, sum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | sambært § 41, stk. 2 í kommunustýrislógini skal hava tvær viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, kann í hesum førinum fíggjast av gjaldførinum hjá kommununi.<br><br>**Framhald 27. apríl 2021**<br>Býráðið samtykti í gjár 26. apríl við 1. viðgerð eina eykajáttan í sambandi við at stuðla skótaliðnum við 150 tús. kr. til í høvuðsheitum at umvæla takið á húsinum. Býráðið skal við 2. viðgerð taka endaliga støðu til, um stuðulin til skótaliðið skal játtast ella ikki. | | |
| Bakgrund | Umsókn um stuðul til skótahúsið | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>• Stuðulspolitikkur | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |
| Tilmæli | Mælt verður til at veita 1/3 av verkætlanarupphæddini | | |
| Dagf | 10.03.2021 | | |



Mentamálanevndin 12. marts 2021:
Nevndin er posetiv um at stuðla Skótunum við at fáa húsið fríðkað. Men málið má í fíggjarnevnd fyri at finna stuðulin. EJ heldur tað vera týdningarmikið at vísa at kommunan hjálpur til, men tað er umráðandi at skótarnir sjálvir, lyfta uppgávuna. GV heldur ikki at umsóknin vísur intiativ til sjálvboðið arbeið.
Nevndin tekur fund við Skótarnar.

**Mentamálanevndin 09. april 2021:**
Tað er ein samd nevnd sum mælir til at FK veitir ein stuðul á 150.000 kr og leggur nevndin hervið málið fyri fíggjarnevndina við áheitan um at taka málið upp á fyrstkomandi fíggjarfundi. Mentamálanevndin kann lata 30.000 kr til samlaðu upphæddina, av rakstrarstað 550.

**Fíggjarnevndin 22. april 2021:**
Fíggjarnevndin samtykti, at mæla býráðnum til at fylgja tilmælinum frá mentamálanevndini, og biðja býráðið um eina eykajáttan á kr. 150 tús. kr. sum stuðul hjá skótaliðnum til serliga at leggja nýtt tak á skótahúsið.

**Býráðið 26. april 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at taka undir við tilmæli frá mentamálanevndin og fíggjarnevndini og við 1. viðgerð játta eina eykajáttan á 150 tús. kr. sum stuðul til skótaliðið til serliga at leggja nýtt tak á húsið.

**Býráðið 27. maj 2021:**
Býráðið samtykti við 2. viðgerð, at játta eina eykajáttan á 150 tús. kr. sum stuðul til skótaliðið til serliga at leggja nýtt tak á skótahúsið.

4

## 18/21
## 21/00200-27 Rokrskapur hjá Fuglafjarðar kommuna fyri 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.05.2021 | 25/21 |
| 2 Býráðið | 27.05.2021 | 18/21 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini |
|---|---|
| Stutt lýsing | Ársroknskapurin hjá Fuglafjarðar kommunu fyri 2020 er grannskoðaður av løggilda grannskoðaravirkinum P/f Januar, undirskrivaður av Fróða Sivertsen, statsautoriseraður revisor og annars grannskoðaður av Snorra á Bøgarði, skrásettum grannskoðara. Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið uppskot til grannskoðaðan roknskap 17. mai 2021,<br><br>Høvuðstølini eru samanumtikið hesi:<br><br>Raksturin av kommununi, uttan íløgur, kostaði 66.502 t.kr. Játtanin var 62.803 t.kr., sostatt ein meirnýtsla upp á 3.699 t.kr. í 2020. Fíggjarliga tyngsta rakstrarøki er § 2, Almanna og Heilsumál, ið stóð fyri 18% av rakstrarkostnaðinum, sum í høvuðsheitum stavar frá eldrasamstarvinum Nánd. Størst meirnýtsla í 2020 var á rakstrarøki 6, teknisk mál, á 3.709 t.kr.<br><br>Íløgurnar vóru 65.933 t.kr. Játtanin var 81.926 t.kr., sostatt ein minninýtsla á 15.993 t.kr. í 2020. Størsti íløguposturin er § 4, undirvísing, viðvíkjandi nýggja barnaskúlanum, umframt íløgurnar í ítróttarhúsið og eldrasambýlið Vesturstovu.<br><br>Eykajáttanirnar í 2020 vóru upp á 5.302 t.kr., herav 3.022 t.kr. til rakstur og 2.280 t.kr. til íløgur.<br><br>Lønarútreiðslurnar í 2020 vóru 39.560 t.kr. ímóti 34.796 t.kr. í 2019, sum er ein hækking upp á t.kr. 4.764.<br><br>Inntøkurnar í 2020 vóru 101.288 t.kr. í mun til metingina á 99.060 t.kr., sum er ein inntøkuhækking á 2.228 t.kr. Størsta broytingin var í persónsskattinum, sum varð 70.259 t.kr. í mun til metingina á 67.561 t.kr., sum er ein hækking í persónsskattinum á 2.698 t.kr. Partafelagsskatturin gjørdist hinvegin 2.297 t.kr. lægri enn mett varð; 16.702 t.kr. í mun til metingina á 19.000 t.kr. |

5

| | |
|---|---|
| | Sammett við 2019, so eru rakstrarútreiðslurnar í 2020 hækkaðar við 693 t.kr. Íløgurnar eru hækkaðar við 13.187 t.kr., í høvuðsheitum grundað á bygging av nýggjum barnaskúla.<br><br>Viðvíkjandi inntøkunum, so eru tær í 2020 hækkaðar við 995 t.kr. sammett við 2019.<br><br>Samanlagt gjørdist gjaldførisúrslitið frá rakstrinum (RLÚ) eitt hall upp á 31.147 t.kr. ímóti einum halli í 2019 upp á 18.262 t.kr.<br><br>Kommunan hevur í 2020 goldið 3.770 t.kr. í avdráttum av lánum. Nettoskuldin var við árslok 0,94 av einari álíkning á 23%.<br><br>**Framhald 21. mai 2021**<br>Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi 20. Mai 2021 ársroknskapin hjá Fuglafjarðar kommunu fyri 2020, og samtykti at mæla býráðnum til at góðkenna fyriliggjandi ársroknskap. |
| Bakgrund | Roknskapurin fyri 2020, sum skal latast landsmyndugleikanum áðrenn 1. juni 2021 |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>**Kommunustýrislógin**<br>**Roknskaparkunngerð kommununar**<br><br>• Møgulig fylgiskjøl<br>**Ársroknskapur 2020**<br>**Grannskoðanarprotokoll í mun til ársroknskapin** |

Viðgerð

| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
|---|---|---|---|
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Umsitingin mælir til, at góðkenna fyriliggjandi ársroknskap hjá Fuglafjarðar kommunu fyri 2020 | | |
| Dagf | 17. mai 2021 og 21. mai 2021 | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Fíggjarnevndin 20. maj 2021:**
Fíggjarnevndin samtykti, at góðkenna ársroknskapin hjá Fuglafjarðar kommunu fyri 2020, og mælir býráðnum til at góðkenna ársroknskapin.

**Býráðið 27. maj 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at fylgja tilmælinum hjá fíggjarnevndini og góðkendi ársroknskapin hjá Fuglafjarðar kommunu fyri 2020. Samtíðis samtykti býráðið, at núverandi grannskoðaravirkið, P/f Januar, heldur áfram við at grannskoða roknskapin hjá Fuglafjarðar kommunu.

7

## 19/21
## 21/00240-3 Meka_Nýggj el-innllegging

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 15.04.2021 | 30/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2021 | 20/21 |
| 3 Býráðið | 26.04.2021 | 15/21 |
| 4 Býráðið | 27.05.2021 | 19/21 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Teknisk nevnd. |
|---|---|
| Stutt lýsing | Ein ástaðarlýsing og kanning av arbeiðsbygninginum Meka á vegadeildini vísir, at el-installatiónin er vánalig. Høvuðstalvan er ikki í lagi, og har installatiónin er ikki jørðað.<br>Trygdarumboðið hevur gjørt vart við, at umstøðurnar á Meka eru ov vánaligar, og at trygdin í sambandi við verandi el-installatión er ikki í lagi. Formaðurin á vegadeildini hevur innheinta tvey tilboð frá tveimum veitarum, sum eru Elcon og JT-Electric. Tilboðini vóru hesi.<br><br>1. Elcon – Tilboð áljóðandi kr. 88.345,- u/mvg<br>2. JT electric – Tilboð áljóðandi kr. 85.640,- u/mvg<br><br>Tá tað er eitt lógarkrav, at el-veitingin skal vera í lagi fyri bygningar, so mátti umsitingin avgreiða málið skjótt, og bleiv arbeiðið sett í gongd beinanvegin, har avgjørt varð at biðja JT-Electric um at gera arbeiðið.<br><br>Sjálvt grevstrararbeiðið fyri nýggjari innføring og jørðkaðali ger vegadeildin sjálv.<br><br>**Fíggjarviðurskifti**<br>Tilboðið frá JT electric ljóðar uppá kr. 90.993,- v/6,25 % mvg. Grevstrararbeiðið verður mett til umleið kr. 10.000,-, sum verður fíggjað av rakstri. Samlala kostnaðarmetingin er mett til kr. 100.000,-.<br><br>Nevndin skal taka støðu til eina eykajáttan til arbeiðið.<br><br>**Framhald 20. apríl 2021**<br>Tekniska nevnd viðgjørdi málið tann 15. apríl í ár við tilmæli til fíggjarnevndina um at veita eykajáttan til at gera el-veitingina í Meka-bygninginum trygga og sambært galdandi lógarkrøvum. Hetta er eitt |

8

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">trygdarmál og neyðugt at gera, tí hetta er arbeiðsstaðið hjá vegadeildini. Ein møgulig eykajáttan verður fíggja av gjaldførinum hjá kommununi.<br><br>Framhald 22. apríl 2021<br>Fíggjarnevndin samtykti í dag, at fylgja tilmælinum frá teknisku nevnd, og biðja býráðið um eina eykajáttan á 100 tús. kr. til at fíggja arbeiðið við nýggjari el-veiting í Meka bygningin. Umbøn um eykajáttan skal hava tvær viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili sambært kommunustýrislógini § 41, stk. 2. Ein møgulig eykajáttan verður fíggjað av gjaldførinum hjá kommununi.<br><br>Framhald 27. apríl 2021<br>Býráðið samtykti í gjár 26. apríl við 1. viðgerð eina eykajáttan á 100 tús. kr. til ger av el-veitingini í Meka bygninginum. Við 2. viðgerð tann 27. mai skal býráðið taka endaliga støðu til eykajáttanina.</td></tr>
<tr><td>Bakgrund</td><td colspan="3">Dagføring av el-innleggingini, sum er eitt lógarkrav.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>Elveitingarlógin<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>FK j. nr. 21/00240-1 Tilboð frá Elcon uppá el-arbeiðið áljóðandi kr. 88.345,- u/mvg<br>FK j. nr. 21/00240-2 Tilboð frá JT electric uppá el-arbeiðið áljóðandi kr. 85.640,- u/mvg</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Umsitingin mælir til at taka av tilboðnum frá JT electric á kr. 85.640,- u/mvg og biðja um eina eykajáttan til arbeiðið áljóðandi kr. 90.992,50.</td></tr>
<tr><td>Dagf</td><td colspan="3">12. apríl 2021.</td></tr>
</table>



**Tekniska nevnd 15. april 2021:**
Nevndin samtykti at taka av tilboðnum frá JT electric, og at fíggja arbeiðið við eini eykajáttan, har málið verður lagt fyri fíggjarnevndina til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 22. april 2021:**
Fíggjarnevndin samtykti, at fylgja tilmælinum frá teknisku nevnd, og fíggja arbeiðið við einari eykajáttan, sum býráðið má taka støðu til.

**Býráðið 26. april 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0) við 1. viðgerð, at fylgja tilmælinum frá teknisku nevnd og fíggjarnevndini, og fíggja arbeiðið við einari eykajáttan á 100 tús. kr.

**Býráðið 27. maj 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0) við 2. viðgerð, at játta eina eykajáttan á 100 tús. kr. til fígging av nýggjari el-veiting í Meka-bygninginum.

## 20/21
## 21/00288-3 Broyting í byggisamtyktini fyri part av økinum, matr. nr. 530, frá B-øki til E-øki, sum er ogn hjá Eilif Eliasen, og matr. nr. 477a, frá B-øki til E-øki, sum er ogn hjá Fuglafjarðar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 18.05.2021 | 38/21 |
| 2 Býráðið | 27.05.2021 | 20/21 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing | Í sambandi við skúlabyggingina av 64-skúlanum, er neyðugt at broyta byggisamtyktina fyri skúlaøkið vestanvert, matr. nr. 477a, sum kommunan er eigari av. Neyðugt er eisini, at kommunan ognar sær part av privatari ogn, matr. nr. 530. Víst verður til FK j. nr. 21/00271, og at hesin parturin av matr. nr. 530, Fuglafjarður, verður fevndur av broytanini av byggisamtyktini.<br>Økið, matr. nr. 477a og partur av matr. nr. 530, verður broytt frá sethúsaøki B til Alment øki/skúlaøki E.<br><br>**Framtíðin hjá Fuglafjarðar skúla**<br>Tá skúlin er liðugt útbygdur, so eru skerdir møguleikar fyri eini útbygging afturat, uttan at hugsa um økið vestureftir.<br>Neyðugt er, at kommunan ger eina heildarætlan fyri økið vestanvert skúlan, og at nevndin gevur umsitingini heimild til at taka uppsamráðingar um keyp av lendi og ognum í hesum øki, hetta fyri at tryggja, at skúlin hevur vakstrarmøguleikar í framtíðini. | | |
| Bakgrund | Broyting av byggisamtyktini fyri skúlaøkið í sambandi við útbygging av 64-skúlanum og skúlanum annars. | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Byggisamtyktin og BK17<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 21/00288-1 Broyting í byggisamtyktini<br>FK j. nr. 21/00288-2 Plantekning av broyting í byggisamtyktini | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at góðtaka uppskot til broyting í byggisamtyktina fyri matr. nr. 477a og part av matr. nr. 530, Fuglafjarður. | | |
| Dagf | 12. mai 2021. | | |

**Tekniska nevnd 18. maj 2021:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, og at umsitingin fyrireikar málið til viðgerð í býráðnum.

**Býráðið 27. maj 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at fylgja tilmælinum frá teknisku umsiting og teknisku nevnd og góðkendi broyting í byggisamtyktini fyri matr.nr. 477a og part av matr.nr. 530, Fuglafjørður.

**21/21**
**21/00198-6 Zeta_Miðnám á Kambsdali_3. byggistig_Útbygging_Skipanaruppskot og myndugleikaprosjekt saman við umsókn um byggiloyvi**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 25.05.2021 | 52/21 |
| 2 Býráðið | 27.05.2021 | 21/21 |

13

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. |
|---|---|
| Stutt lýsing | Umsókn er komin inn frá Zeta vegna, Landsverk, um byggiloyvi til útbygging av Miðnámsskúlanum á Kambsdali, 3. byggistig.<br>Ráðgevin sendi fyrst eitt skipanaruppskot inn til umsitingina, sí FK j. nr. 21/00198-1, har prosjektið bleiv prosjektgranskað. Prosjektgranskingin bleiv síðani send til Zeta. Víst verður til FK j. nr. 21/00198-2.<br>Eisini varð ein ástaðarfundur millum ráðgevan og umsitingina, har alt prosjektið varð gjøgnumgingið.<br><br>Nú hevur umsitingin móttikið umsókn um endaligt byggiloyvi saman við myndugleikaprosjektinum, sí viðheftu skjøl. Víst verður til FK j. nr. 21/00198-4.<br><br>Tekniska deild hevur gjøgnumgingið innsendu verkætlanina við atliti til verandi byggisamtykt og BK17.<br>Eisini hevur tilbúgvingarleiðarin verið inn yvir verkætlanina við atliti til brunavegir og brandpostar.<br><br>Umsitingin hevur útskrivað byggiloyvi sambært umsókn og mynduleikaprosjekti. Víst verður til FK j. nr. 21/00198-5.<br><br>Tá talan er um ein stóran bygning, so skal tekniska deild góðkenna prosjektið og ætlaðu útbyggingina. Málið skal fyri í býráðnum til endaliga góðkenning.<br><br>Útbyggingin kemur at hava ABA-anlegg.<br><br>**Framhald 26. mai 2021**<br>Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi í gjárkvøldi umsóknina um byggiloyvi í sambandi við 3. Byggistig viðvíkjandi útbygging av miðnámsskúlanum á Kambsdali, og mælir nevndin býráðnum til at játta byggiloyvi. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Bakgrund | Betra um verandi umstøður á Minámsskúlanum á Kambsdali. | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Byggisamtyktin og BK17<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 21/00198-1 Zeta_Skipanaruppskot<br>FK j. nr. 21/00198-2 FK_Prosjektgransking send til Zeta<br>FK j. nr. 21/00198-4 Zeta_Umsókn um byggiloyvi_Mynduleika-prosjekt<br>FK j. nr. 21/00198-5 FK_Byggiloyvið | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir nevndini til at taka undir umsitingini um at geva byggiloyvi til útbygging av Miðnámsskúlanum á Kambsdali 3. byggistig og koyra málið fyri býráðið til endaliga støðutakan. | | |
| Dagf | 18. mai 2021. | | |



**<u>Tekniska nevnd 25. maj 2021:</u>**
Tekniska nevnd samtykti at geva byggiloyvi sambært umsókn um byggiloyvi saman við fylgiskjølum og mynduleikaprosjekti.

**<u>Býráðið 27. maj 2021:</u>**
Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum hjá teknisku nevnd og játta byggiloyvi til útbygging av miðnámsskúlanum á Kambsdali, 3. byggistig, sambært teimum treytum, sum Fuglafjarðar kommuna gevur í brævi til umsøkjaran, dagfest 18. mai 2021.

**22/21**
**21/00326-3 Uppskot til útstykkingarætlan í Rossagerði millum landsvegin og bygt øki omanfyri Toftanesvegin á økinum frá matr. nr. 771a til matr. nr. 786, Fuglafjørður**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 25.05.2021 | 49/21 |
| 2 Býráðið | 27.05.2021 | 22/21 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. |
|---|---|
| Stutt lýsing | Fuglafjarðar kommuna arbeiðir við at útvega fleiri fjøltáttaðar bústaðarmøguleikar til borgaran. Kommunan arbeiðir við einum øki í Rossagerði, og hevur sett skjøtil á at fáa lendi til vega til hesa verkætlan. Umsitingin arbeiðir miðvíst við at gera avtalur við jarðareigarar, við tí fyri eyga at fáa lendi til hesa verkætlan og aðrar verkætlanir við.<br>Jarðarkeypið fevnir um lendi á vestara landinum.<br>Fyri at seta skjøtil á verkætlanina, hevur tekniska deild arbeitt við at gera tvey dispositiónsuppskot til útstykkingarætlan í Rossagerði, soleiðis at jarðarkeypið og uppskot til útstykkingarætlan ganga hond í hond.<br>Ein avbjóðing er verandi vegaatkoman til Rossagerði frá landsvegnum, sum má loysast.<br><br>**Framhald 26. mai 2021**<br>Talan er um tvey uppskot til útstykkingarætlan: Uppskot 1 er blandað bústaðarbygging við randarhúsum, grundøkjum til vanliga bústaðarbygging, har grundøkið umframt fríøkir og almenn økir. Uppskot 1 hevur tilsamans 30 íbúðareindir.<br><br>Uppskot 2: Blandað bústaðarbygging við raðhúsum, punkthúsum við íbúðareindum og grundøki til sethús. Uppskot 2 hevur tilsamans 32 íbúðareindir.<br><br>Íbinding er oman til Toftanesvegin og parkeringsviðurskiftini eru skipaði í báðum uppskotum.<br><br>10% fríøki til samlaða øki.<br><br>25 metur linjan til landsvegin og inn til mark verður hildin.<br><br>Til umrøðu í býráðnum. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| Bakgrund | Fáa til vega fleiri útstykkingarætlanir til fjølbroyttan bústaðarmarkna. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt Byggisamtyktin og BK17<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>FK j. nr. 21/00326-1 og 2 Uppskot nr. 1 og 2 til útstykkingarætlan | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Umsitingin mælir til at nevndin tekur undir við fyrireikingunum til útstykkingarætlan í Rossagerði, og tá keyp av lendi er komið undir land, verður arbeitt meira ítøkjuligt víðari við ætlanini. | | |
| Dagf | 21. mai 2021. | | |

**Tekniska nevnd 25. maj 2021:**

Nevndin samtykti at taka undir við uppskotunum um útstykkingarætlan í Rossagerði, og at málið verður lagt fyri býráðið til ummælis. 16

**Býráðið 27. maj 2021:**

Býráðið umrøddi uppskot um útstykkingarætlan í Rossagerði og hildu uppskotið varð jaligt og at tað hevur fleiri bústaðarmøguleikar við sær. Býráðið ynskti eisini fakfólk uttanifrá til at menna uppskotið víðari.

Fundurin lokin kl. 21:40.

Gerðabókin lisin og góðkend.

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Sonni á Horni

David Andreasen

Edva Jacobsen

Magni Jøkladal

Ólavur Larsen

Gudny Vang

Eivin Breiðaskarð



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo